Avtalan við ES um heilsufrøðilig viðurskifti

Ásmundur Guðjónsson

Tórshavn, 2 januar 2001

Fyrsta februar kemur í gildi avtalan við ES um heilsufrøðilig (veteriner) viðurskifti. Okkara fiskavørur hava tá lættari atgongd til ES-marknaðin, tí innflutningseftirlitið í ES verður lagt niður og hevur tað fíggjarligar og aðrar fyrimunir við sær fyri okkara høvuðsvinnu.

Avtalan kemur eisini at hava nakrar broytingar við sær fyri okkara innflutning úr ES og 3.londum sum t.d Íslandi. Harafturat skapar avtalan møguleikar fyri at víðka samhandilin við ES til onnur dýr enn bara fisk.

Fiskivinnan ynskti somu sømdir sum galda fyri Ísland og Norra

Fyri nøkrum árum síðani, tá EØS avtalan millum Ísland, Noreg (EFTA) og ES kom í gildi broyttist útflutningsmøguleikarnir fyri íslendskum og norskum fiski rættiliga nógv. Okkara kappingarneytar fingu fíggjarligar fyrimunir av avtaluni, tá ES-innflutningseftirlitið datt burtur. Føroyska fiskivinnan gjørdi landsstýrinum vart við hetta við umbøn um, at taka upp samband við ES-myndugleikarnar um at gera eina avtalu, sum gav okkara fiskivinnu somu sømdir sum kappingarneytar okkara.

Tað skuldi ganga drúgv tíð áðrenn ES-myndugleikarnir svaraðu umbønini, men tá tað hendi, gekk skjótt at fáa avtaluna.

Avtalan „limar“ Føroyar inn í ES á heilsufrøðiliga økinum

Samráðingarnar við ES komu í fyrstu syftu at snúgva seg um sjálvan avtaluformin. Ísland og Noreg høvdu fingið sínar sømdir gjøgnum EØS avtaluna og hana kund samráðingarfólkini av góðuum grundum ikki taka støði í, tí Føroyar ikki eru limir í EFTA. At gera ein serstakan leist fyri eina avtalu bert galdandi fyri Føroyar, varð av ES umboðunum ikki hildið at verða politiskt skilagott at borðreiða fyri ES-komissiónini. ES umboðini bjóðaðu afturímóti, at vit brúktu leistin, sum ES hevur brúkt í samráðingunum við Andorra, San Marino og aðrar pinkutjóðir. Hetta varð lagt fyri landsstýrið, sum gekk við til henda leist.

Avtalan hevur form av eini rammuavtalu um heilsufrøðilig viðurskifti og er sett sum ískoyti í handilsavtaluna millum Føroyar og ES. Tað er kanska vert at nevna her at veteriner viðurskifti í ES fevna um øll dýr – herí er eisini fiskur. Avtalan er bert um veteriner viðurskifti og hevur als onga ávirkan á aðrar tættir í handilsavtaluni.

Rammuavtalan gongur í stuttum út uppá, at føroyskir myndugleikar viðurkenna ta veterinereru lóggávuna og skipanina, sum er galdandi í ES. Ein undirnevnd skal síðani gera uppskot um lóggávu og skipan, føroyingar skulu seta í verk fyri tey økir partarnir semjast um.

Í mars mánaða 2000 hevði undirnevndin fund í Havn, har samráðst varð um ynski føroyinga um at yvirtaka neyðuga ES lóggávu, soleiðis at fiskivinnan skuldi fáa somu sømdir sum í Íslandi og Norra. Úrslitið varð eitt sokallað "Viðmæli" til landsstýrið og ES kommissiónina at taka støðu til.

Rammuavtalan og viðmælið gera, at Føroyar eru innanfyri ES í veterinerum høpi. Føroysku myndugleikar eru undirlagdir ES-kommissionina og hava skyldu til at seta í verk veterinerar lógir og reglur, sum í framtíðini koma úr Brússel. Eftirlitsmyndugleikin í ES, sum er "Food and Veterinary Office" í Dublin, kemur at hava eftirlit við, um føroyska skipanin virkar nøktandi og eftir ES reglum.

Okkara fiskaútflutningur til ES verður í framtíðini at rokna sum samhandil eins og galdandi er millum tvey ES limalond. Vit koma harafturat at virka sum ytra mark hjá ES og skal allur beinleiðis innflutningur úr 3. londum avgreiðast gjøgnum eina sokallaða marknaðeftirlitsstøð, sum fult og heilt arbeiðir eftir ES-reglum.

Viðmælið – tann veterineri fiskapakkin – fevnir um 17 ES-direktivir. Ein kan býta hesa lóggávu í tvinnandar partar, ein sum greinar út tær almennu lógarreglur, sum skulu setast í verk og hin parturin snýr seg um serligu reglurnar, sum eru galdandi fyri fisk.



Avtalan við ES um heilsufrøðilig viðurskifti fer at lata upp fyri nýggjum vinnumøguleikum her á landi, metir Ásmundur Guðjónsson

Tann almenni parturin inniheldur:

- Reglur um beinleiðis innflutning úr 3. londum (lond uttan fyri ES, EFTA og Føroyar)
- Reglur um skipan av eftirlitinum herí eisini avgjøld fyri tænastur

Tann serligi fiskaparturin inniheldur:

- Reglur um framleiðslu av fiski
- Reglur um framleiðslu av fiskmjøli, lýsi og fóðri
- Reglur um viðger av burturkasti frá fiskivinnu og alivinnu (slógv, garnar ot)
- Reglur um heilivágsleivdir og onnur óynskt evnir í alifiski
- Reglur um sjúkuprogramm fyri alifisk
- Reglur um aling av kræklingum, øðum o.t

Fiskivinnan sparir tíð og pening

Tað, sum tað heila snýr seg um, eru útflutningsviðurskifitini hjá fiskivinnuni. Fyrimunirnir hjá fiskivinnuni eru fleiri og ymiskir og eru allir tengdir at niðurleggingini av marknaðeftirlitinum hjá ES. Hetta merkir at:

- Vinnan sparir álagda avgjaldið fyri marknaðeftirlitið
- Vinnan kemur at vinna tíð, tá eftirlitið verður tikið av (avgreiðslan fellur burtur).
- Vanliga fyribrigdi við at vørupartíir verða send retur av eftirlitinum fellur burtur
- Vinnan kann sjálv velja fyrstu havn í ES (skal ikki longur verða um eina marknaðeftirlitsstøð)
- Heilsuváttanir Starvsstovan flýggjar út fella burtur.

Okkara innflutningsreglur verða broyttar.

Tann stórsta prinsipiella broytingin, sum avtalan við ES hevur við sær, er broytingin á okkara innflutning úr ES og eisini úr 3. londum, sum til dømis Ísland.

Sum fyrr nevnt skal allur beinleiðis innflutningur úr 3. londum inn í ES (og Føroyar) avgreiðast av eini marknaðeftirlitsstøð, sum er innrættað og gjørd út alt eftir hvørju vørusløg og dýr støðin er ætlað til. Innflytarin ger sjálvur av, hvørja stað í ES hann velur til at avgreiða 3. landsvøruna.

Skipanin í ES er soleiðis, at lond kunnu biðja um at fáa 3. landsstatus fyri einstaka matvørur ella dýr. Tá skal myndugleikin í landinum syrgja fyri at framleitt verður sambært teimum ES-direktivum, sum eru aktuel. Hesi virkir skulu síðani á ein lista, sum skal góðtakast av ES. Innflutningseftirlitið í ES skal síggja til at bert vørur frá góðkendum virkjum koma inn í ES. Harafturat eru hesar vørur álagdar eitt ávíst og neyvt eftirlit áðrenn tær hava frítt at fara í ES. Føroyar hava havt 3. landsstatus viðvíkjandi fiskavørum síðani 1993.

Føroyskur innflutningur av vørum við dýrauppruna beinleiðis úr 3. londum snýr seg í høvuðsheitum um fisk frá russiksum skipum, agn úr fjareystri ella falklandsoyggjunum, feskt/fryst kjøt úr Íslandi, New Zeelandi, Brasilia og Australia umframt eitt sindur av viðgjørdum kjøtvørum og eggum úr Íslandi.

Burtursæð frá russara-fiskinum er tað bara viðvíkjandi Íslandi at nýggju innflutningsreglurnar koma at merkjast eitt sindur fyri innflutningin úr 3. londum. Ísland hevur nevniliga trý sløg at status mótvegis ES: Á fiskaøkinum er tað samhandil, fryst fiskur seyðakjøt hevur Ísland 3. landsstatus, meðan viðgjørdar kjøtvørur og egg als ongan status hava og kunnu sostatt ikki seljast á ES-marknaðinum. Tískil kunnu hesar seinast nevndu vørur heldur ikki seljast í Føroyum.

Ísland er farið undir samráðingar við ES um at víðka samstarvið á heilsufrøðiliga økinum.

Russiskur fiskur – ein trupulleiki í Norðurevropa

Russiskur fiskur er ein serligur trupulleiki í innflutningsviðurskiftunum. Støðan er nevniliga hon, at størsti parturin av russiska trolaraflotanum í Barentshavinum ikki stendur á listanum yvir skip, sum er góðkend. Fiskur frá hesum skipum skal sostatt – eftir pappírinum – als ikki landast í ES, ei heldur í Norra, Íslandi ella í Føroyum.

Hinvegin er tað eisini alment kent at veruleikin í ES, Íslandi og Norra er ein annar enn tað skrivað stendur. Hesin fiskur verður nevniliga landaður alla staðni í Norðurevropu. Hetta sjálvt um eftirlitsmyndugleikin í Dublin og tann hjá EFTA hava gjørt vart við hetta og kravt at tað heldur uppat. Veterinerumyndugleikarnir í ES klára ikki tað politiska trýstið, sum er frá tí svanga marknaðinum. Fiskiídnaðurin hjá ES og hinum londunum við hava harðliga brúk fyri hesum fiski.

framhald á næstu síðu

Frítt at innflyta djór til Føroya

Tá avtalan við ES um heilsufrøðilig viðurskifti kemur í gildi 1. februar, fer tað millum annað at bera til frítt at flyta livandi djór úr ES londum til Føroya, uttan at hesi skulu í sonevnda karantenu fyrst. Men tað fer ikki at bera til at flyta føroysk djór til ES lond eftir somu reglum. Føroysku djórini skulu framhaldandi hava undantaksloyvi og setast í karantenu.

ES-AVTALA

Rúnar Reistrup

ES borgarar, ið ferðast til Føroya, fara eftir 1. februar í ár ótarnaðir at kunna taka síni húsdjór við inn í landið, um teimum lystir. Føroyingar, ið ferðast til ES lond, kunnu eisini ótarnaðir taka ein fittan hund ella eina slangu heimaftur við sær. Einasta treyt er, at djórið fær eina sonevnda veterinærattest, ella djóralækanagóðkenning, í tí landinum, tað verður útflutt frá. Ikki er neyðugt at søkja um loyvi.

Hetta er ein av avleiðingunum av avtaluni við ES um heilsufrøðilig viðurskifti, sum fyrst og fremst er ætlað at geva føroysku fiskivinnuni betri sømdir.

Men í Føroyum er fiskivinnan tann einasti parturin av umfatandi økinum »heilsufrøðilig viðurskifti« ið fær fyrimun av avtaluni í fyrsta umfari. Fyri ES londini merkir avtalan hinvegin, at øll djór og djóraúrdráttir so sum kjøt, egg, fiskavørur og líknandi kunnu innflytast frítt til Føroya. Fyri Føroyar merkir avtalan í fyrsta umfari bert, at fiskur og fiskaúrdráttir kunnu flytast frítt úr Føroyum til ES lond.

Við frítt verður sipað til at vørurnar sleppa undan innflutningseftirliti.

Bøndur stúra fyri sjúkum

Millum tey, sum ikki eru so fegin um hesar hjávirkningarnar av at føroyska fiskivinnan hevur fingið betri livikor á ES marknaðinum, eru bøndurnir, ið stúra fyri at sjúkur, sum ikki enn finnast í Føroyum, fara at koma til landið við innfluttu djórunum.

Eftir galdandi lóg, sum er frá 1908, er altumfatandi forboð ímóti innflutningi av djórum til landið. Skulu djór flytast til landið, skal landsdjóralæknin veita undantaksloyvi fyri hesum. Harafturat skal djórið kannast og setast í karantentu, tá tað kemur til landið

Men tá Bjørn Harlou tók við landsdjóralæknaembætinum í 1995, linkaði hann mannagongdini munandi, og síðan tá hava so at siga øll, ið søkt hava, fingið undantaksloyvi at innflyta djór.

Hetta kemst sambært Bjørn Harlou, landsdjóralækna, av, at lógin ikki longur er tíðarhóskandi og at tað tíð stríðir beinleiðis ímóti samtyktunum hjá heimshandilsfelagsskapinum WTO fullkomuliga at bannað øllum innflutningi av djórum.

Sambært landsdjóralæknanum er tað tí ikki talan um stórt annað enn eina tillagan av lógini til galdandi mannagongd, tá tað 1. februar verður frítt at flyta deyð og livandi djór úr ES londum til Føroya uttan innflutningseftirlit.

– Nógv djór eru innflutt til Føroya farnu árini, og tað sær ikki út til at hava gjørt tann stóra skaðan. Mær vitandi er bert ein nýggj hundasjúka staðfest í Føroyum, sum helst er komin til landið við onkrum innfluttum djóri, men talan er um eina óskaðiliga sjúku, sum er løtt at viðgera, sigur Bjørn Harlou, sum tí ikki heldur at óttin fyri sjúkum eigur at vera so stórur.

Farnu fimm árini eru millum annað fleiri enn 100 hundar, einar 50 kettur og 50-60 hestar innfluttir til Føroya. Hesi djórini hava øll fingið undantaksloyvi frá landsdjórlæknanum, og eru kannaði og sett í karantenu, tá tey eru komin til landið.

– Tá avtalan við ES um heilsufrøðilig viðurskifti kemur í gildi 1. februar, sleppa fólk undan at søkja um undantaksloyvi, og tá verða djórini kannað í tí landinum, har tey verða útflutt frá. Landsdjóralæknin skal tó framvegis hava fráboðan um hvørt einasta djór, sum kemur inn í landið, sigur Bjørn Harlou.

Føroysk djór sleppa ongan veg

Men hóast tað í roynd og veru fer at bera ES borgarum til at taka kettur sínar við á summarferiu í Føroyum eftir 1. februar, so fer tað framvegis at vera eins strilti at flyta føroysk djór til ES lond, og tað altíð hevur verið.

Fyri at hetta skal broytast, skal avtalan við ES útbyggjast, og tað er sum skilst einki til hindurs fyri annað enn, at eitt meira umfatandi eftirlitsverk skal byggjast upp her á landi og síðan góðkennast av ES.

– Tá tað hendir fer tað millum annað at bera hestaeigarum til at taka hestar sínar til kappingar uttanlands og tá verður tað sum heild eins lætt at flyta djór úr Føroyum til ES lond og tað verður at flyta tey úr ES londum til Føroya um ein lítlan mánað, sigur Bjørn Harlou, landsdjóralækni, sum tó ikki torir at gera gitingar um, nær umstøðurnar vera til hetta.



Savnsmynd

framhald

Í 1999 innfluttu vit umleið 8.000 tons av russiskum fiski (íroknað smærri nøgdir frá øðrum 3. londum). Av teimum fór størra helvtin til virkingar í Føroyum, meðan hin helvtin var flutt útaftur uttan nakra virking – fiskurin var í transit.

Nýggju innflutningsreglurnar koma at hava við sær, at vit skulu broyta mannagongdirnar viðvíkjandi transitgóðsi, tí okkara núverandi transithugtak er væl meira liberalt enn tað í ES. Fiskurin skal í framtíðini avgreiðast um eina marknaðeftirlitsstøð - fyrst skal hann inn í ES fyri seinni at fara útaftur.

Samhandil bindur báðar

Samhandilin við ES førur við sær, at báðir partar niðurleggja sítt innflutningseftirlit. Vit kunnu ikki longur brúka innflutningseftirlit sum eina forðing fyri at loya vørum og livandi dýrum til Føroya. Hevur eitt dýr ella ein vøra frítt at fara í ES, hevur hon eisini frítt at fara til Føroya.

Tær reglur ella tær avmarkingar vit seta skulu verða "ikki-diskriminerandi" sum tað eitur. Tað merkir, at sama krav skal verða sett til føroysku framleiðsluna, sum vit seta til vøruna, keypt úr ES.

Men tað kann tykjast sum um avtalan ikki er í líkavekt, tá alt kann flytast til Føroya, men bert fiskur til ES. Vit hava álagt okkum sjálvum forboð fyri útflutningi av øðrum vørum ella dýrum enn fiski. Til tess at fáa loyvi til onnur dýr og vørur skulu vit yvirtaka regluverkið fyri tað dýraslagið vit meta er aktuelt. Vit hava longu infrastrukturin kláran og íverksetanin skuldi sostatt verið løtuverk.

Í Føroyum hevur í nøkur ár verið ein innflutningskunngerð galdandi, sum hevur heimilað Heilsufrøðiligu Starvsstovuni at nokta innflutningi av ella at burturvísa vørur, sum eru fongdar við salmonellu. Samhandilin ger, at henda kunngerð verður sett úr gildi, tí hon virkar diskriminerandi. Ynskja vit framhaldandi somu salmonellaverju, skal onnur kunngerð gerast, sum ikki ger mun á føroyskum og útlendskum vørum og harumframt kunnu vit ikki longur leggja eftirlitið í innflutningsliðið, men skulu hava eftirlitið í søluliðnum.

Hinvegin eru kortini møguleikar fyri at seta í verk innflutningsavmarkingar, tá talan er um eina sjúku ella salmonellu til dømis. Men tá gera heilt serligar reglur seg galdandi. Vit skulu tá hava eitt vísundaliga skjalprógvað niðurberjingarprogram fyri salmonellu í Føroyum, sum fevnur um kanningar og atgerðir fyri tey salmonellaviðbreknu økini. Í einum slíkum programmið kann sjálvandi eisini innganga innflutningsreglur salmonelluni viðvíkjandi. Eitt slíkt program skal góðkennast av ES.

Livandi dýr hava "frítt" at fara

Sum við mati soleiðis eisini við livandi dýrum (eisini t.d eygarognum og yngli), tey hava eisini frítt at fara. Føroyar hava í longri tíð havt ein politikk viðvíkjandi livandi dýrum, sum hevur verið bygdur á innflutningsbann yvirhøvur, men landsdjóralæknanum hevur verið heimilað at gera undantøk frá banninum. Vit hava onki vísundaliga grundað sjúkuprogramm til tess at skjalprógva sjúkustøðuna í Føroyum alment, sum kundi verið brúkt til at hildi uppi einum møguligum framhaldandi banni. Tað sum hevur verið er ítøkiligar atgerðir til tess at avmarka og berja niður sjúku, har hon er komin í.

Núverandi landsdjóralækni hevur verið meira liberalur í sjúkuáskoðan í sambandi við innflutningi av livandi dýrum enn undanfarnu landsdjóralæknar og hevur brúkt undantaksregluna ofta tá livandi dýr eru komin til landi. Í avtaluni við ES verður henda veterinera linja so at siga staðfest.

Tað er tó ein sannleiki við modifikatiónum, tá ein sigur at dýrini hava "frítt" at fara í ES. Tá eitt dýr hevur frítt at fara krevst at landaøkið (sonan), haðani dýri stavar, er frítt fyri sjúkuna, hugt verður eftir. Somuleiðis krevst, at dýrahópurin heldur ikki hevur sjúkuna og at enda skal ein djóralækni váttað, at dýrið var frískt, tá tað fór avstað.

Hetta er so tann tryggleiki myndugleikarnir kunnu geva. Men tað er tó onki til hindurs fyri at vinnan sjálvboðin setur í verk karantenuskipanir og líknandi ella kanska semist um als ikki at keypa livandi dýr úr útlondum.

Avtalan gevur rúmd fyri fleiri nýggjum vinnumøguleikum

At vit eftir 1. februar eru í felagsmarknaðinum á heilsufrøðiliga økinum gevur okkum nakrar møguleikar innan matframleiðslu, sum vit ikki hava havt sum 3. land. Hjá hesum londum skulu vørurnar góðkennast av ES eftir galdandi ES-krøvum fyri vøruna, tá tær koma til markið. Hetta er jú ikki galdandi fyri londini, sum eru innanfyri. Hetta skuldi so kunna skapt møguleikar fyri útflutningi av føroyskum mati er hann framleiddur eftir andanum í ES-lóggávu.

Vit eiga tí beinanvegin eftir 1. februar at kanna um føroyskt vinnulív og landbúnaður er sinnaður at seta í verk fleiri av direktivunum í ES, sum til dømis innan kjøt (neyt og seyð), villini dýr (sjófugl), mjólk, egg, flogfenað og so framvegis. Hetta til tess at skapa neyuðugu karmarnar fyri útflutningsmøguleikum. Vit eiga somuleiðis kanna marknaðin fyri sølu av føroyskum mati.

Vit eiga beinanvegin at fara undir at gera okkara reglur fyri framleiðslu av røstum fiski, hóast hetta er ein vøra, sum er ókend í ES høpi. Fylgja vit andanum í fiskareglunum skulu vit syrgja fyri at henda framleiðsla fer fram í eini skipan, sum Starvsstovan kann meta sum heilsufrøðiliga forsvarlig.

Um vit yvirtaka seyðalóggávuna hava vit møguleika fyri at gera brúk av okkara glæsiliga framleiðslutóli, nevniliga føroyska hjallinum, til virking av røstum og turrum kjøti (og fiski) við útflutningi fyri eygað. Eitt sindur frítt hugsað kunnu vit í framtíðini møguliga eisini innflyta livandi seyð til slakt og hanga krovini til ræsingar fyri síðani at flyta kjøtið útaftur.

Áðrenn vit koma so langt eiga við at leggja til rættis eitt granskingararbeiði, sum kann tryggja at kjøtið hongt verður upp bæði bakteriologiskt og teknologiskt er hóskandi til ræsing í Føroyum.

Seinastu tíðina hava vit hoyrt frá Útoyggjanevndini, Fiskivinnuskúlanum og Starvsstovuni, at arbeitt verður við at gera møguleikar fyri blandaðari framleiðslu á sjálvbodnum sum hevur støði í náttúrliga tilfeinginum á staðnum. Hetta eru spennandi tankar, sum saman við ES-avtaluni kanska leggja lunnar undir størri lønandi virksemi á útoyggjunum.